# Løgmaður hyggur bæði aftur og fram



*Í síni fyrstu nýggjársrøðu fer Løgmaður at umrøða tey bakkøst, sum føroyska samfelagið hevur verið fyri í brátt farna ári. Men mesti og áhugaverdasti parturin er røðuni er tann parturin, har hann lítur frameftir. Mangan eru boð eftir løgmanni at halda røðu. Her heldur hann røðu umborð á Smyrli tollaksmessudag, tá ið nýggja samferðsluhavnin varð tikin í nýtslu*

**Hóast hon ikki varðar meiri enn slakar 10 minuttir, liggur nógv arbeiðið aftanfyri fyrstu nýggjársrøðuna hjá Jóannes Eidesgaard, sum hann fer at halda í kvøld**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta verður ein røða, sum bæði lítur aftureftir- og frameftir.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, skal í kvøld halda sína allarfyrstu nýggjársrøðu.

Og hann dylir ikki, at hann kennir tað sum ein heiður at sleppa at halda nýggjársrøðu fyri Føroya fólki.

Og hann hevur eisini givið nýggjársrøðuni tað fyrireiking, sum hann heldur, at slík røða hevur uppiborið.

Tí at tað er ein stór løta, ivast løgmaður onga løtu í.

– Hetta er ein røða, sum rættiliga nógv fólk lurta eftir. Hetta er kanska einasta høvi, løgmaður hevur at røkka inn í at kalla hvørt einasta heim í landinum.

– Tí er hetta ein serlig kensla at halda mína fyrstu nýggjársrøðu.

Men av tí sama er eisini neyðugt at velja orðini við umhugsni og tað hevur Løgmaður eisini gjørt.

– Hóast nýggjársrøðan bara er slakar 10 minuttir, er hetta ikki ein røða, sum verður skrivað uppá ein seinnapart. Eg havi hugsað væl og leingi um, hvat eg skal siga og tað eru nógvir dagar, síðani fyrsta útkastið til røðuna varð skrivað.

– Samstundis havi eg ráðført meg við nógv fólk um, hvat skal vera við í røðuni, so tað hevur verið ein rættiliga long tilgongd, frá tí at eg fór at hugsa fyrstu tankarnar um, hvat skuldi standa í røðuni, til nú, eg standi við henni í hondini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður heldur eina aðra stóra røðu hvørt ár og tað er Ólavsøkurøðan.

Men hann heldur ikki, at nýggjársrøðan og ólavsøkurøðan kunnu samanberast.

Ólavsøkurøðan er lógarásett og hon er ein partur í politiska arbeiðnum, har farið verður í smálutir við nógvum ymsum viðurskiftum.

Hinvegin er nýggjársrøðan ein meiri persónlig røða frá landsins leiðara til allar føroyingar.

**Aftureftir og frameftir**

Jóannes Eidesgaard sigur, at í hesi fyrstu nýggjársrøðuni fer hann at líta bæði aftureftir og frameftir.

– Eg fari at líta aftur á gongdina í 2004, har eg fari at taka samanum, hvussu farna árið royndist, bæði á politiska økinum og á vinnuliga økinum.

– Á politiska økinum hava vit fingið bæði nýtt løgting, nýtt landsstýri og nýggj bý- og bygdaráð. Og á vinnuliga økinum hava vit havt stór bakkøst, serliga í alivinnuni, men eisini í fiskivinnuni sum heild.

Men løgmaður fer eisini at líta frameftir og fer at umrøða, hvat er til ráða at taka fyri at styrkja okkum vinnuliga og búskaparliga. Og hetta er kanska mest áhugaverdi parturin í røðuni.

Jóannes Eidesgaard vil ikki kalla røðuna dapra, hóast stór bakkøst hava verið, men hon flýggjar heldur ikki undan veruleikanum.

– Men tann parturin, sum viðgerð tað gamla og farna, er ikki tað, sum fyllir mest, tó at tað ikki skal gloymast. Tað, sum fær mestu umrøðuna í nýggjársrøðuni, er avgjørt tann parturin, har eg hyggi frameftir og royni at vísa á gongdar leiðir frameftir.

Og løgmaður heldur, at hóast útlitini kanska ikki eru tey allarbjartastu, er tað kortini ikki ein ókend støða, sum samfelag okkara er í.

– Tað hevur altíð gingið upp og niður í føroyska samfelagnum og í løtuni eru tíðirnar ikki so góðar, sum tær hava verið.

– Okkara uppgáva sum politikarar, er at royna at forða fyri, at sveiggini verða ógvusligari enn neyðugt og í hesum sambandi fer løgmaður í nýggjársrøðuni at nema við nøkur viðurskifti, sum hann heldur, eiga at verða tikin upp.

Løgmaður fer eyðsæð mest at røða um heimlig viðurskifti, men hann fer eisini í ávísan mun at umrøða viðurskifti úti í heimi.

Tað er kl. 19 í kvøld at løgmaður fer at halda nýggjársrøðuna og hon verður send beinleiðis bæði í útvarpi og sjónvarpi.

# Arbeiðið upp á miðnámsskúlan í Vági bjóðast út um tvær vikur

**Tað allarfyrsta, sum nývalda býráðið í Vági skal taka støðu til, er eitt søguligt mál og tað er byggiloyvið til miðnámsskúlan**

MIÐNÁMSSKÚLI Í VÁGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Arbeiðið uppá miðnámsskúlan í Vági verður bjóðað út um tvær vikur*

Arbeiðið at fyrireika arbeiðið at byggja miðnámsskúlan í Vági heldur fram, ótarnað av rumblinum ið er uppstaðið í kjalarvørrinum á ætlanunum um at flyta hann til Hovs.

Og tað allarfyrsta, sum tekniska nevnd í nývalda býráðnum skal taka støðu, er eitt søguligt mál og tað er byggiloyvið til miðnámsskúlan í Vági.

Dánjal Bjarkhamar er bæði formaður í teirri fráfarandi teknisku nevndini og teirri, sum tekur við í morgin, tá ið nýggja valskeiðið byrjar.

Og hann sigur, at nakrar dagar fyri jól sendi arkitektavirkið, sum fyrireikar skúlan, býráðnum skriva, har tað søkir um byggiloyvi til skúlan, vegna mentamálaráðið.

Saman við umsóknini eru so tekningar yvir skúlan.

Arkitektavirkið biðjur um eina skjóta viðgerð í býráðnum, tí ætlanin er at bjóðað arbeiðið upp á skúlan út um miðjan januar, ella um einar 14 dagar.

Týskvøldið skipaði býráðið seg við nýggjum borgarstjóra, varaborgarstjóra og nevndum eftir býráðsvalið í november. Les grein aðrastaðni í blaðnum um tað.

Og Dánjal Bjarkhamar ætlar at tað skal verða tann nývalda tekniska nevndin, sum fær høvi at viðgera umsóknina.

Hann sigur, at málið verður tikið upp beint eftir ársskiftið.

– Umsóknin um byggiloyvi til skúlan verður tað allarfyrsta málið, sum tann nývalda tekniskar nevndin fær til viðgerðar og skal taka støðu til.

Hann leggur afturat, at hann ætlar, at tekniska nevnd skal viðgerða málið skjót og taka eina skjóta avgerð, tí skal arbeiðið bjóðast út um miðjan januar, hevur tað skund at avgreiða byggiloyvið.

Annars hevur ljóðað, at landsstýrið hevur lagt arbeiðið at fyrireika skúlan á ís ímeðan spurningurin um at flyta hann til Hovs, verður viðgjørdur, men sambært hesum, verður arbeitt við byggiætlanini í Vági sum um onki var hent. Dánjal Bjarkhamar veit sjálvsagt ikki, hvørja støðu tekniska nevnd kemur til, men tað er lítið at ivast í, at skúlin fær byggiloyvið.

Ætlanin er, at skúlin skal vera liðugur í 2006.